

# Tannlæknahjálp sum missión

**Vit halda áfram við frásøgnini um lívið hjá Daniel J. Danielsen. Hann ferðast ótroyttiligur úr bygd í bygd fyri at breiða boðskapin. Hann er nógv saman við Arthur Brend, sum er tannlækni. Hetta gevur enn ein møguleika fyri at koma á tal við fólk**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**7. partur**

Sum frásagt í seinasta parti sendi Daniel J. Danielsen javnan brøv til bretska missionsblaðið Echoes of Service við frásøgn frá virki hansara í Føroyum, og halda vit í hesum parti áfram við at endurgeva nøkur av brøvunum, sum stóðu í hesum blaði. Vit meta hesi brøv at vera ein part av lýsingini av Daniel.

## Tænasta og tørvur í Føroyum

*15. desember 1907 skrivar Daniel:*

Í mong ár hevur Br. Sloan sáa hitt góða sáið her á oyggjunum og nógv signing er komin burtur úr

Men nú orkar hann ikki so væl longur, tí hann er farin at eldast. Tað er so hart at ferðast hjá honum. Alex Mitchell, sum nú er í Noregi og D. M. Campbell, sum nú er í Danmark, hava arbeitt her fyrr. Tað hevur gingið framá, og nú nærkast samkoman í høvuðsstaðnum teimum 40 fólkunum, og millum teirra eru eisini fleiri, sum tað bragdar í. Í hálvtriðja ár havi eg verið við í hesum verki og ferðast frá oyggj til oyggj. Men tað eru fleiri oyggjar, hagar eg eri boðin uttan at kunna fara orsakað av kostnaðinum.

Vegurin er opin fyri evangeliinum í nærum øllum oyggjum og fólk leingjast eftir okkum. Tað eru nøkur fá trúgvandi í ymiskum plássum, og tey biðja onkran koma at prædika Guds orð.

Tað er mangan harmiligt at síggja, aftaná at long tíð er liðin, hvussu Satan hevur tikið burtur gleðina og einføldu trúnna. Tá hugsað verður um, hvussu trupult tað er at ferðast her uppi, er tørvur á tveimum ella trimum evangelistum.

## Mitchell um gamla Sloan

Campbell var í Føroyum 1903-1905. Sloan og hann kendust frá Hetlandi, har teir høvdu hildið møti saman í 1877.

Alex Mitchell var í Føroyum 1890-1899. Hann og Sloan ferðaðust nógv saman. Hann var ikki sørur fyri at duga sjúkraviðgerð.

Her skal eisini endurgevast nakað av tí, sum Mitchell skrivaði í Echoes of Service um gamla Sloan, tá hann var deyður.

*Vit høvdu níggju eydnusom ár saman, og tað var ikki ilt orð okkara millum, sum eg minnist. Hann var ein fínur samstarvsmaður, og sera lagaligur at arbeiða saman við. Vit ferðaðust saman, prædikaðu saman, svóvu saman, og enntá brutu breyðið saman nógvar ferðir í einsemi úti í haganum, har eingin annar var til staðar. Kæri Mr. Sloan var ærdur og virdur maður í Føroyum. Hansara vitnisburður var ikki bert eitt eiti. Han gekk áhaldandi í ljósinum, ja, hann veruliga gekk við Gudi. Hann var ein undangongumaður á hesum einsamøllu oyggjum. Hann var tolin, eisini tá tað var mótbrekka, men hansara áhaldandi arbeiði hevur givið góða frukt. Hann vil vera nógv saknaður, ikki minst millum tey trúgvandi kring oyggjarnar. Hann var ein friðarins maður, og honum dámdi ikki ósemjur.*



*Greinirnar í Echoes of Service høvdu eisini myndir. Á hesi myndini úr Havn sæst Ebenezer*





*Eisini hevði blaðið mynd av grindadrápi*

## Prædika í dansistovum

*27. mai 1908*

16. mars fór eg til Suðuroyar og vitjaði hvørja bygd í norðaru helvt. Um Gud vil, taki eg sunnaru helvt seinni. I trimum av bygdunum hevði eg møti í eina viku. Í teirri størstu bygdini varð dansistovan full hvørt kvøld. I Hvalba er ein lítil samkoma, og eg fann tey trúgvandi væl fyri bæði sálarliga og likamliga.

Men onnur vilja ikki koma í teirra hús á møti, so her leigaði eg eisini dansistovuna. Her var stúvað í tvey kvøld, men tá vildu eigararnir ikki lata meg hava hana longur. Vit máttu tá leiga eitt neyst. Har trekti illa og ikki var tað væl egnað, og bert fá komu. Men vit høvdu eina signaða tíð, og Harrin virkaði við okkum. Í triðja plássinum gekk betri at fáa dansistovuna, og her kom eisini væl av fólki, nøkur spurdu um vegin til frelsu.

Síðan eg kom aftur, havi eg sent meira enn 30 bíbliur og nýggjatestamentir til hesi pláss umframt tey, eg seldi á staðnum. Í Føroyum verða bíbliur ikki keyptar at standa í hyllunum. Tær verða keyptar av mongum orsøkum. Summi vilja kanna hana fyri at prógva, at vit eru á skeivari leið. Onnur fyri at samanbera gomlu trúnna, sum fólk kalla hana, við tað, sum vit siga. Men tey flestu leita í henni eftir frelsaranum, og takkað verið Gud, tey sum søkja Hann, vilja finna Hann.

13. apríl doypti eg eina systir úr Vágum, sum arbeiddi hjá einum bakara í Havn. Hon varð beinanvegin søgd úr starvi, men aðrir vegir opnaðu seg fyri henni, og hon frøðist. Ein bróður úr somu